Ítróttar
Sosialurin
Nr. 96 • hósdagur • 19.-21. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# FSF letur eyguni aftur

**Kappingarnevndin gav eingi leikbann, tá fundur var á skránni hósdagin. Heldur ikki hóast í minsta lagi tvey videoklipp úr næst seinastu 3-2 sending sýndu grov brot á allar ítróttarligar reglur**



*Hóast tvey og kanska trý mál, har leik- og dystarbann tóktust sum sjálvfylgja, hálsaði Kappingarnevndin hjá FSF um. Hildið varð fyri eygu og oyru, meðan ónollur av ringasta slag vórðu varpaðar kring alt landið*

*Viðgjørd mynd: Álvur Haraldsen*

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*

Tá FSF fyri hálvum øðrum ári síðani boðaði frá, at teir nú fóru at gera nýtslu av sjónbandaupptøkum, tá reyð kort og møgulig leikbann skuldu viðgerast, hevði hetta tvey endamál. Annað var, at spælarar, sum av órættum høvdu fingið reytt kort, skuldu sleppa undan enn meira órættvísi við leikbanni. Og hitt at spælarar, sum sýndu grov brot, uttan at dómarin sá hesi, nú skuldu fáa ta revsing, sum hesir høvdu uppiborið.

## Upphavið

Serliga vóru tað tvær hendingar í kappingarárinum 2004, sum vóru atvoldin til, at nýggja siðvenjan varð innførd. Ein siðvenja, sum fleiri ferðir hevði verið upp á tal, men sum tó ongantíð var tikin í praksis. Onnur tá spýtt varð á Rógva Jacobsen hjá HB, uttan at dómarin sá hetta, og hin, tá B36-málverjin Magnus Poulsen fekk reytt kort, hóast talan púra greitt var um sjónleik frá mótstøðuspælara.

Táverandi kappingarstjórin, Bjarki Mohr, staðfesti, at tær báðar hendingarnar sera greitt sýndu, hví hann helt eina nýggja siðvenju vera neyðuga. Í fyrra førinum sá alt Føroya land, hvat gekk fyri seg, men hóast hetta kundi spælarin ikki revsast við teimum amboðum, sum kappingarnevndin hevði til taks. Og í seinna førinum var nevndin noydd at geva tveir daga leikbann til málverjan, hetta grundað á dómarafrágreiðinga. Eisini hóast allir hyggjarar so ruddiliga kundu staðfesta, at talan átti at verið um gult kort til álopsspælaran, heldur enn reytt til málverjan.

## Hørð linja

At Kappingarnevndin fekk heimild at nýta video, varð nýtt í einum einstøkum føri í fjør, tá endin av dystinum millum TB og B36 gjørdist meira rokmikil, enn gott var.

Í ár varð linjan løgd hampuliga hart. Eftir dystin millum HB og B36 tann 26. apríl, kom illstøða millum B36-venjaran og dómaran. Grundað á uppstøkurnar fekk B36-venjarin ein dag leikbann. Ein sera prinsipiellur dómur, tí einki sum helst varð viðmerkt um hendingina í dómarafrágreiðingini, og ikki minni prinsipiellur, tá Sigfríður Clementsen ikki so mikið sum fekk hoyringsskriv, áðrenn dystarbannið varð útskrivað.

Bara tvey umfør seinni varð nýggja linjan trykkprøvað. Sjónbandaupptøkur sýndu greið misbrot bæði í Klaksvík og í Vági. Og í Ítróttartíðindunum kvøldið fyri hevði B68-venjarin alt annað enn tespiligar viðmerkingar um dómaran í dystinum. Tí var væntandi, at hamarin fór at fella hart, tá Kappingarnevndin skuldi hava næsta fundin.

## Hamarin fall ikki

Hamarin varð tó ongan tíð havdur á lofti. Kappingarstjórin, Høgni í Stórustovu, sigur, at tey í løtuni ivast í, hvørt reglurnar og mannagongdirnar innan øki. Og tí varð tikin um, at eingi leikbann verða útskrivað her og nú av teirri ávum. Ein avgerð, sum reisir hópin av spurnarteknum.

Ikki minst man B36-venjarin, Sigfríður Clementsen, kenna seg illa viðfarnan. Ein støða, sum Høgni eisini sigur seg skilja.

– Vit eru komnir til ta støðu, at vit fyrst vilja hava nakrar fortreytir upp á pláss, áðrenn vit fara at nýta sjónbandaupptøkur. Her hugsi eg ikki minst um tær reglur, sum ein komandi disciplinærnevnd skal brúka.

Men tit hava longu nýtt slíkar. Kann tað ikki vera sera trupult at síggja eina linju í avgerðunum?

– Tað kanst tú væl siga. Men eg haldi eisini, at hetta prógvar, hvussu týdningarmikið tað er við einum kjaki um hetta. Í løtuni er 3-2 tað besta, vit hava, men er hetta nóg gott dómsgrundarlag? Og hvussu tryggja vit okkum nóg góðar reglur á økinum? Alt tað eru spurningar, sum eiga at greiðast.

Og skulu hyggjar kring landið ímeðan so bara góðtaka ónollur av somikið grovum slag, sum vóru at síggja í næstseinasta umfarinum?

– Tað er eisini ein góður spurningur. Tí í nøkrum førum verður somikið greitt farið um mørkini, at vit eiga at spyrja okkum sjálvar, hvørt hetta á nakran hátt kann góðtakast, sigur Høgni í Stórustovu.

**Dystir um vikuskiftið**

**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 21.05 | Skála-ÍF | Dagfinn Olsen |
| 21.05 | B36-NSÍ | Eiler Rasmussen |
| 21.05 | KÍ-GÍ | Georg Rasmussen |
| 21.05 | VB/S-EB/S | Lassin Isaksen |
| 21.05 | B68-HB | Jens Petur Brattalíð |

1. deild

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 20.05 | FSV04-KÍ | Ransin N. Djurhuus |
| 20.05 | SÍ-AB | Rúni Gaardbo |
| 20.05 | Royn-HB | Jón K. í Brekkuni |
| 20.05 | VB/S-TB | Lars Müller |
| 20.05 | LÍF-B71 | Jónleif Frederiksen |

2. deild

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 21.05 | B68-MB | Jóannes Mikkelsen |
| 21.05 | ÍF-GÍ | Eugen Voda |
| 21.05 | NSÍ-B36 | Høgni Hansen |
| 21.05 | HB-Fram | Bergleif Sólsker |
| 21.05 | Skála-EB/S | Edvard Højgaard |

1. deild kvinnur

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 21.05 | KÍ-SÍ | Jónleif Frederiksen |
| 21.05 | GÍ-AB | Bárður Mortensen |
| 21.05 | NSÍ-B36 | Vinjard Dam |
| 21.05 | HB-EB/S | Thorvald Petersen |

## Nøkur dømi

**Her *varð* video nýtt**
Á Sevmýri í fjør, tá rok er móti dystarenda í dystinum millum TB og B36. Sum úrslit fær Jón Johannesen leikbann í tríggjar dystir, Bergur Midjord fær tveir dystir og hjálparvenjarin hjá B36, Magni Mohr, fær ein dyst.

Í Gundadali í ár, tá HB og B36 spæla. Eftir dystin er B36-venjarin, Sigfríður Clementsen í øðini inn á dómaran. Einki verður skrivað í frágreiðingina, men Kappingarnevndin hjá FSF gevur venjaranum ein dag dystarbann.

**Her varð video *ikki* nýtt**
Eftir heimadyst hjá NSÍ móti KÍ fjør fær Ikechukwu Onyema tríggjar dystir leikbann grundað á dómarafrágreiðingina. NSÍ vil hava FSF at hyggja at sjónbandinum, sum teir meta greitt vísir, at talan var um hendiliga hending. Tilburðurin er tó ikki í klippunum, sum verða víst í 3-2, og tí verður sjónbandaprógv ikki nýtt.

Tá GÍ og HB spæla í Gøtu í ár, fær Sámal Joensen reytt kort fyri at skumpa HB-spælara umkoll. Hóast sjónbandið vísir, at tað er Poul Ennigarð, sum fremur brotið, stendur leikbannið hjá Sámal Joensen kortini við. Í somu hending sæst Janus Mohr Joensen fara yvir til liggjandi gøtumann, uttan at hetta tó verður tikið upp av kappingarnevndini.

Í dystinum millum VB/Sumba og B68 í Vági sýna sjónbond týðiliga, at Ralph van Dooren hjá B68 klípir Dan Djurhuus millum beinini, meðan dómarin ikki sær. Hendingin fær tó ikki nakrar avleiðingar fyri B68-spælaran.

Í somu 3-2 sending sýna myndir frá dystinum millum KÍ og HB, at Vagnur Mohr Mortensen hjá HB slær Oddmar á Lakjuni. Heldur ikki hesa hending hevur kappingarnevndin valt at revsa.